# Føroyskir yvirmenn um

**Føroyar og føroyingar seta ein stóran dám á Logos Hope, sum eftir nógvar umvælingar og fyrireikingar, loksins fór sín fyrsta túr seinast í februar**

## Hjálpararbeiði

**Heri Simonsen**
heri@sosialurin.fo




*Logos Hope stevnir út frá havnini í Køge á sínum fyrsta túri*
*www.logoshope.com*



*Skiparin, Uni Nolsøe úr Húsavík*

Skipið er bygt í Rendsburg í Norðurtýsklandi í 1973. 10 tey fyrstu árini æt ferjan »Gustav Vasa«, og sigldi hendan ferjan millum Malmø í Suðursvøríki og Travemunde í Norðurtýsklandi. Í 1983 kom ferjan til Føroya, og fekk hon navnið »Norrøna«. Í yvir 20 ár var hendan ferjan motorvegurin hjá føroyingum til Europa. Í mars 2004 varð gamla Norrøna seld til kristna felagsskapin, OM, sum í trimum førum hevur vitjað oyggjar okkara við sínum skipum, ávikavist Logos, Doulos og Logos 2. Gamla Norrøna, sum nú ber navnið »Logos Hope«, fer at stevna inn á Havnarvág hálvan apríl, og verður talan um eina serliga kensluborna løtu fyri føroyingar at síggja gomlu Norrønu aftur. Mikudagin 11. mars, áðrenn Logos Hope fór sín fyrsta túr, vitjaði eg umborð á skipinum, sum í sínari tíð varð mett at vera flaggskip føroyinga. Skipið lá tá enn í Køge.

### Merkt av Føroyum

Fyri at sleppa umborð, mugu vit hava eina avtalu við onkran, sum arbeiðir umborð. Eirikur Gunnarsson, maskinmeistari, verður garantur hjá okkum, og vit sleppa umborð at vitja. Altjóða trygdarkrøvini mugu haldast. Í móttøkuni fáa vit nøkur skelti at hanga um hálsin sum prógv um, at vit eru gestir. Skipið er rættiliga nógv merkt av Føroyum og føroyingum. Ein landslagsmálningur frá Sandoynni, sum Bibi Sigmundardóttir hevur málað, er enn at finna umborð á skipinum, og ávís støð og rúm umborð á skipinum hava nøvn, sum eita okkurt við »Faroe«. Logos Hope er eisini skrásett í Føroyum, og er tað tí føroyska Merkið, sum veittrar í húnar hátt.

Millum tey, sum hava gjørt skipið klárt til nýggju tænastuna, og til tað rættiliga nógv øðrvísi uppgávuna, eru føroyingar, sum eiga nógv spor umborð. Eyðun Joensen frá Radiobúðini í Runavík hevur tikið eitt stórt tørn, tá tað kemur til at installera ta teknisku útgerðina umborð. Konan, Helen, hevur eisini hjálpt nógv til umborð, og hitta vit tilkomnu hjúnini á brúnni hendan dagin, vit vitja. Somuleiðis hevur Eirikur Gunnarsson úr Havn eisini verið og hjálpt nógv til í maskinrúminum. Nógvir aðrir føroyingar hava eisini tikið styttri og longri tíðarskeið umborð, fyri at hjálpa til at gera skipið klárt.

### Føroyingar á brúnni

Tað vóru føroyskir navigatørar, sum tóku gomlu Norrønu – Logos Hope – á sína fyrstu ferð úr Køge á Sælandi til Gøteborg í Vestursvøríki. Hetta var 10 dagar eftir, at vit vitjaðu umborð. Skipið vitjar í skrivandi stund býin, Harlingen í Hollandi, og skal eisini vitja eina aðra hollendska havn, nevnliga Scheveningen, áðrenn leiðin gongur til skotska høvuðsstaðin, Edinburgh tann 30. mars.

Skipið skal liggja í Edinburg til tann 14. apríl, tá loyst verður, og siglt verður aftur til staðið, har skipið eigur største partin av sínari 36 ára longu søgu, nevnliga Føroyar. Skipið skal liggja í Havn í døgunum frá 16. apríl til 23. apríl, og í Klaksvík í døgunum frá 23. apríl til 27. apríl. Skipari umborð er Uni Nolsøe úr Húsavík, og 2. stýrimaður er Trúgvi Petersen úr Gøtu.

### Ein æra at føra gomlu Norrønu

Á brúnni heilsi eg uppá Una Nolsøe skipara. Eitt tað fyrsta eg spyrji hann er, um tað er ein stór æra at føra gomlu Norrønu?

– Tað vil eg siga. Tað er ein æra at vera við í hesari verkætlanini. Hóast Uni nú førir gomlu Norrønu, so viðgongur hann, at hann var ongantíð og vitjaði á brúnni, tá skipið var í fastari sigling millum Føroyar og grannalondini.

Tá vit vitja umborð, verður hond løgd á tær síðstu fyrireikingarnar at gera skipið klárt at fara í sigling. Hendan mikudagin fyrst í februar er Uni bjartskygdur, at skipið fer at verða klárt, og tað vísti seg at halda. Spurdur, hvussu tað er at vera skipari fyri einari manning, sum hevur sítt upphav í so nógvum ymiskum londum, svarar Uni:

– Jú tað er veruliga ein upplivíng í sær sjálvum, serliga mett við tað, sum eg eri vanur við. Uni hevur starvast umborð á einum tangaskipi, har 25 mans plaga at vera umborð. Uni hevur ferðast víða á heimshøvunum, og hevur hann siglt úti tey seinastu 15 árini. Uni metir seg vera fyrsta húsvíking, sum hevur verið við einum OM-skipi.

### Gamal dreymur gingin út

Hjá Una hevur tað verið ein gamal dreymur at sleppa við einum OM-skipi.

– Tað eru nógv ár síðani, eg fyrstu ferð las um OM og OM-skipini. Eg havi altíð kunnað hugsað mær at sloppið við einum OM-skipi, og javnan hevur tankin um at fara við OM vitjað meg. Eg havi við tíðini kent tað sterkari og sterkari, at eg skuldi fara við OM.